Dagf. 1. desember 2020
HMR J. nr. 20/00940-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 45/2020 eftir § 52a í tingskipanini um lønarviðurskifti í sjúkrahúsverkinum, frá Ingilín D. Strøm, løgtingskvinnu (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvørjar grundgevingar eru fyri, at vaskifólkini á Landssjúkrahúsinum fáa lægri byrjanarløn enn vaskifólkini á hinum báðum sjúkrahúsunum?

2. Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at gera batar á hesum økinum?

Til spurning 1
Orsøkin er, at vaskifólkini á teimum trimum sjúkrahúsunum ikki hava somu setanarviðurskifti.

Vaskifólkini á Klaksvíkar sjúkrahúsi og á Suðuroyar sjúkrahúsi eru tímalønt. Í Klaksvík eru vaskifólkini sett sambært sáttmála millum Klaksvíkar Arbeiðsmanna- og kvinnufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, og á Tvøroyri eru vaskifólkini sett sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Á Landssjúkrahúsinum eru vaskifólkini sett í starv eftir sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðskvinnufelag. Góður helmingurin av vaskifólkunum á Landssjúkrahúsinum eru í føstum starvi, sum hevur nøkur rættindi við sær og gevur eina hægri eftirløn.

Til spurning 2
Undir fyrireikingini hjá Fíggjarmálaráðnum til sáttmálasamráðingarnar, hevur Sjúkrahúsverkið gjørt vart við, at tørvur er á at gera broytingar í sáttmálanum við Havnar Arbeiðskvinnufelag, so lønin til vaskifólk verður meira kappingarfør.

Í løtuni hevur Landssjúkrahúsið sera ilt við at fáa mannað leysu stø[…]